## Útihýsir ikki upptøkur

FIFA-forsetin, Sepp Blatter, sigur nú, at hann einki hevur ímóti, at upptøkutól í framtíðini skulu kunna avgera, um ein bóltur hevur verið inni ella ikki. Men hann er bert sinnaður at royna hetta, um tøknin annars loyvir tí. Kjakið um málupptøkur er kyknað aftur, eftir at eitt mál var viðurkent í einum dysti í næstbestu týsku deildini herfyri, hóast bólturin var ein metur frá at hava verið innanfyri.



## Leeds gjørdi tað aftur

Jermaine Beckford, sum fyri tveimum vikum síðani skoraði sigursmálið á Old Trafford, bjargaði leygardagin Leeds umdyst ímóti Tottenham í ensku FA Cup-kappingini, tá hann skjeyt bæði málini í 2-2 javnleikinum. Undan hesum hevði danski málverjin, Casper Angergren, lagt botn undir sensatiónina við brotssparksbjarging, áðrenn Beckford fór í gongd, so Leeds fær nýggjan dyst á Elland Road.



Fleyr vann fyrsta sett ímóti SÍ, men so var eisini liðugt hjá havnarmonnunum, ið aftur eru dragnaðir á stigatalvuni
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Fleyr-SÍ 1-3 (29-27, 18-25, 16-25, 17-25)

# Fleyr misti eitt fet

**Tapið fyri SÍ í gjár merkir, at menninir hjá Fleyr mistu í mun til tey bæði liðini frammanfyri, so finalusessurin kámaðist enn meira**




Hilmar Jan Hansen

Tá SÍ og Fleyr fyri góðari viku síðani spældu finalu í Føroya Banka-kappingini í Klaksvík, var eingin ivi um, hvat av liðunum var tað stinnara, tí SÍ vann ein sannførandi 3-0 sigur og spældi seg samstundis beinleiðis í steypafinaluna.

Í gjár, tá liðini aftur møttust í landskappingini, var SÍ framvegis tað betra av teimum, men hesa ferð var avrikið langt frá líka sannførandi. Verri var tað tó hjá Fleyr, ið heldur ikki hesa ferð megnaði at lyfta seg so mikið, at tað rakk nakran veg.

Undantakið var tó fyrsta sett, ið gjørdist vørrurin hjá Fleyr hesa ferð. Havnarmenninir komu á heimavølli væl frá byrjan, men so kom SÍ afturíaftur og hevði leiðsluna tað mesta av tíðini. Við leiðsluni 24-23 hevði SÍ enntá settbólt, men fekk nú so harða kapping frá Fleyr um síðstu bóltarnar, at Fleyr vann 29-27!

Hetta var løtan hjá Fleyr í gjár, sum serliga hevði trupulleikar í móttøkunum og tí heldur ongantíð fekk glið á álopsspælið. Trý tey næstu settini gjørdi SÍ slætt borð, men framvegis uttan at spæla líka væl sum í Klaksvík vikuna áðrenn.

### Nógvir feilir

Rajko Petrovic var største hóttanin, SÍ hevði at seta ímóti Fleyr, og hann vann eisini eina rúgvu av stigum. Men tað vóru tó teir nógvu feilirnir, ið vóru at síggja frá báðum pørtum, ið kanska mest merktu dystin, ið ikki er ein av teimum, ið endar í søgubókunum.

Fyri SÍ merkti sigurin, at liðið framvegis hongur væl í og er beint í hølunum á Mjølnir, meðan Fleyr nú er fýra stig aftan fyri sørvingar og fimm stig aftan fyri klaksvíkingar. Tað røkist tí einki fyri øðrum, enn at Mjølnir og SÍ alsamt meira líkjast teimum báðum liðunum, ið skulu spæla FM-finalur eftir lokna landskapping.

Hin dysturin í hesum umfarinum verður spældur í Badmintonhøllini í Klaksvík annaðkvøld klokkan 19.30, tá Mjølnir tekur ímóti ÍF.

### Mjølnir-Fleyr 3-1 (19-25, 25-15, 25-21, 25-22)

# Mjølnir jagstrar finaluna

**Undan dystinum stóð á jøvnum millum Mjølnir og Fleyr, men við kærkomna heimasigrinum staðfestu kvinnurnar hjá Mjølnir, at liðið aftur er komið á slóðina**




Hilmar Jan Hansen

Tá Mjølnir og Fleyr fyri góðari viku síðani møttust í hálvfinaluni í Føroya Banka-kappingini, var tað Fleyr, sum hevði munin og vann. Men í gjár, tá liðini møttust í Eik-liguni, var vent í holuni, tí hesa ferð gjørdist Mjølnir drúgvara liðið.

Í fyrsta setti var Mjølnir á odda til miðskeiðis í settinum, tá støðan var 12-9, men næstu løtuna vann Fleyr 11 bóltar og Mjølnir bara vann tveir. Fleyr megnaði at halda leiðsluna og fór avstað við settinum.

Eisini í øðrum setti byrjaði Mjølnir betur, men hesa ferð var eingin slingur í valsinum, so Fleyr skuldi sleppa upp í part, og so var støðan 1-1 í settum. Líka so javnt var tað eisini leingi í triðja setti. Men aftan á 15-15 slapp Mjølnir avstað og vann settið.

Nú skuldi Mjølnir bara vinna eitt sett aftrat og var eisini væl á veg, tá Fleyr svaraði aftur og kom upp á javnt. Men Mjølnir, sum yvirhøvur spældi ein góðan dyst, hevði munin í avgerandi løtunum, og tí eydnaðist at vinna triðja settið og dystin.

Sigurin merkir, at Mjølnir framvegis fylgir væl við TB, sum í løtuni er størsti avbjóðarin hjá TB. Hinvegin mundi tað kennast tungt hjá Fleyr at missa eitt fet í finalukappingini, samstundis sum kvinnurnar úr Havn nú hava tapt tríggjar týðandi dystir á rað.